Nr. 1  Februar 2016  69 árið

# KIRKJULIGT MISSIÓNSBLAÐ



Fællesbrev nr. 126 Arusha 20/1  2016

# Når vi det?

Julebrevet blev skrevet, men sidste fællesbrev har et stykke tid på bagen. I december tog vi endnu en tur til YMCA i Moshi, hvor vi tog en uges ferie. Der var planlagt to, men Dorothy, vores design- og layout dame havde sagt op, da hun skulle flytte tilbage til Kenya for at passe familiens forretninger (de Brook Resort, Voi). Så der var en masse foldere, blade og bøger, vi lige skulle have færdige, inden hun rejste, så der var lidt luft, indtil en ny kunne blive ansat. **Vi nåede det**, men så måtte vi tage en uges oprydning og sortering af papirer i designafdelingen efter Dorothys afrejse. 8 søgte siden Dorothys stilling og vi endte med i begyndelsen af januar at have ansættelsessamtale med den ene. Stillingen er nu genopslået. Kan man sige, at man kan designe og layoute uden at have prøvet det på en computer, fordi man har haft nogle timer om det i et undervisningsforløb på universitetet? Det er vist en kulturforskel, der skal tages højde for. Nu står der i det næste stillingsopslag – mindst to års erfaring.

**Når de det?**

I slutningen af november og begyndelsen af december var Thomas Kildeholm Jensen, missionær i Sumbawanga, på besøg i en 10 dages tid. Der blev arbejdet intenst med hans og Anne-Lenes bogprojekt om pædagogik samtidig med at et par skoler blev besøgt:

1. Step by step learning center, der særligt satser på at hjælpe børn med indlæringsvanskeligheder (http://www.sslc-tz.com/), hvor Sverre og Berit Svensen fra Norge arbejder.

2. St. Judes, hvor man satser på at give de fattigste af de fattigste, der har evnerne, en gratis uddannelse fra primary school til og med form 6 i secondary school, altså fra 1. klasse til studentereksamen. Projektet begyndte for 12 år siden og har i dag ca. 1.900 elever og ligger resultatmæssigt i toppen i Tanzania. . (http://www.schoolofstjude.org/). De fleste elever bor på kostafdelingen, men skolen har også 32 busser til at hente og bringe elever, som bor hjemme. Og så er det fyringsgrund, hvis en ansat slår en elev. Projektet er primært støttet fra Australien, og Liz fra Australien, der arbejder der, arrangerede besøget. Vi lærte hende at kende efter en søndagsgudstjeneste. Thomas og Anne-Lene fik god inspiration og arbejder videre med bogprojektet, der helst skal være færdigt, inden vi rejser herfra. **De er sikre på, at de når det.**

**Vi nåede det nye år – og motorcyklen**

NytårsaftEN var vi sammen med vores naboer, Bjarte og Anita Øen, og deres norske gæster. De kom til Tanzania i 2012 og Bjarte har i ti år været international leder af Kristen Sportskontakt. I søndags havde vi dem til afskedsmiddag, da de er på vej hjemover, og fremover skal arbejde fra Norge igen. I julen havde vi blandt andet besøg af nye missionærer fra Danmark, Benjamin og Lea Harboe og deres fire små børn Noel, Nova, Luis og Lisa. De arbejder ud fra New Life Outreach – et arbejde startet af pinsemissionærerne Egon og Hannah Falk.

Hvad gør man, når man skal have en motorcykel, snakker norsk, fransk, engelsk og lidt til – men ikke swahili, og den medarbejder, man har mødt i udstillingslokalet, kun snakker swahili? Så må man hellere få fat i en missionær. Mette Marit, der arbejder som psykolog på et projekt på Haydom hospital, og som vi efterhånden har været en del sammen med, når hun er i Arusha, fik så Peter med ud at købe den. Der blev købt en sort boxer (se billede). Så bliver det lidt lettere at komme rundt på ture i landskabet.

**Vi skal nå menneske**

For at nå mennesker med evangeliet sender vi missionærer, og fra d. 8/1 til d. 13/1 havde vi missionærkonference (den for 2015 blev holdt i jan-16) lidt syd for Bagamoyo, der ligger nord for Dar es Salaam. Bagamoyo var kysthovedstaden, hvorfra slaverne blev udskibet. Slaveriet blev forbudt. Den tyske kolonimagt, at Dar es Salaam var et bedre sted, så den tyske administration af landet blev flyttet dertil. Bagamoyo blev et lidt forsømt sted.

Feriestedet, hvor konferencen blev holdt, lå ud til en stor smuk lagune (lidt ligesom Ringkøbing fjord), hvor forskellen mellem ebbe og flod virkelig kunne ses ligesom ved Vadehavet.

På programmet var badeture; smuk, smuk sejltur gennem lagunen ud til det indiske ocean; strategidrøftelser; bibeltimer ved Odd Geir Nordland, direktør for Soma Biblia, og Carsten Skovgaard Holm, vice generalsekretær og ansvarlig for international mission; gudstjeneste ved Peter; børnemøde ved Anne-Lene; bedemøder; samtaler; børneprogram ved blandt andet vores norske Soma Biblia volontør, Åsmund; Louisa, der hjælper vores nye missionærer Brian og Signe Bjørn Nielsen med deres børn og så Simon, Anne og Nina, der arbejder i Sumbawanga og var udlånt fra BDM.

Kristine Ballantyne, missionskonsulent, og Asger (medlem af landsstyret) og hans kone, Anne, var med fra Danmark. Og så havde de bragt en masse godt med fra Danmark, bl.a. pølse, oste, lakrids og den slags. Efter konferencen tog Peter de tre af dem på en dagstur til Bagamoyo og siden fik vi besøg af dem alle fire i Arusha et par dage. Der blev slået et slag for den lokale Tingatinga, en afrikansk malestil, og eksporteret flere oliemalerier til Danmark.

Konferencer er der mange af i denne verden, men godt at der også er *missionær*konferencer, for mennesker **skal nås med evangeliet**, hvis de **skal nå det forjættede land.**

Kærlig hilsen

og Guds fred

Anne-Lene og Peter












PALM BEACH
HOTEL
HAKUNA KUNUNA.
TUNAUZA
VOCHA
ZA
AINA ZOTE

# Orð at byrja dagin við

Gud gav okkum ikki Orð sítt fyri at geva okkum gott lesitilfar, men fyri at broyta lív okkara. Les, lær teg uttanat, grunda á Orðið. Hesi versini eru ein serstakliga treystur og góður morgunmatur, sum tað er **gott** at fáa sær hvønn dag:

Markus 1,35: "Árla á MORGNI fór hann upp og gekk út, og hann fór burtur á ein oyðistað og **helt** bøn."

Tú, sum heldur, at títt lív er ein einasti langur sorgarsangur, eitt harmljóð, lær teg hesi versini úr Harmljóðunum 3,21-24:

"Hetta vil eg leggja mær í geyma, og tessvegna vóni eg: Náði Harrans er ikki uppi, miskunn hans ikki á enda; hon er nýggj á hvørjum morgni, mikil er trúfesti hans. Mín lutur er Harrin, sigur mín sál, tí vil **eg troysta á hann**."

Sálmur 5,4: "ÁRLA (um morgunin) hoyri tú, Harri, mína reyst, ÁRLA eg leggi tær sak mína fyri og bíði."

Jesaja 50,4-5: "Harrin, drottin, gav mær lærusveinatungu, so at eg skuldi styrkja tey maktaðu (tey troyttu); á hvørjum MORGNI hann vekur mítt oyra, at eg má taka **eftir** eins og lærusveinar gera."

Sálmur 118,24: "Hetta er dagurin, ið Harrin hevur gjørt, lat okkum fegnast og **gleðast** á honum!"

Sálmur 23,6: "Eina góðska og náði mær fylgja alla mínar LÍVSINS DAGAR. Í Harrans **húsi eg** dvøljist í endaleysar tíðir."

Ápostlasøgan 17,27-28: "... tó at hann kortini ikki er langt burtur frá nøkrum einasta av okkum; tí at í honum liva vit og rørast vit og eru vit."Sálmur 86,10-11: "Tí TÚ ert stórur, og TÚ gert undur, eingin er Gud uttan TÚ. Lær meg veg Tín, Harri! Eg vil liva í sannleika Tínum; gev **mær heilt** hjarta til at óttast navn Títt!"

Sálmur 87,7B: "Allar mínar keldur eru í **tær**."

Sálmur 19,15: "Lat orð muns míns og hugsanir hjarta míns líka Tær, Harri!"

Effie Campbell umsetti.

# Verjan hjá einum Guds barni

Ein Harrans tænari í Noregi sigur soleiðis: "Eg verði útspiltur í bløðum, fjølmiðlum og á netinum mest sum dagliga, og tí biði eg hart hetta Guds orðið út yvir meg og hús mítt: "Einki svørð, ið smíðað verður ímóti tær, skal fáa sigur; hvørja tungu, ið talar ímóti tær, skalt tú sakfella. Hetta er lutur tænara Harrans, tað rættlæti, sum teir fáa hjá mær, sigur Harrin." (Jes. 54,17) Eg biði eisini hart hetta orðið: "Eins og spurvin, ið flagsar burt, og svalan, ið fer á flog, so er grundaleys illbøn – hon rínur ikki á." (Orðt. 26,2)

Síðani vælsigni eg allar fíggindar mínar, tí Guds orð sigur: "Vælsignið teir, sum søkja at tykkum, vælsignið, og bannið ikki!" (Róm. 12,14)

Tá ið mær tørvar fyrigeving fyri syndir mínar, ja, so er tað við Guds egna orði, at eg komi fram fyri Faðirin og biði: “Takk Harri, at tú hevur fyrigivið mær synd mína, sum eg nú havi játtað fyri tær. Tí orð títt sigur í 1. Jóh. 1,9: “Um vit játta syndum okkara, tá er hann trúfastur og rættvísur, so at hann fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá allari órættvísi.”

Minst til, at Gud Faðir er fullkomiliga bundin at orði sínum, og hann hevur givið orði sínum æru fram um navn sítt. (Sálm. 138,2) Tí eigur Guds orð at vera hægsti myndugleiki í lívi okkara. Vit vita, at tá ið vit æra Guds orð, tá ber tað ugga, bjarging og æru til okkara.

Effie Campbell umsetti.

# Fyrimunirnir við at lesa Guds orð

“... orð tíni mega verða gleði og fagnaður fyri hjarta mítt ...” Jer. 15,16.

Gud lovar ávís ting til teirra, sum taka sær stundir til dagliga at læra hann betur at kenna gjøgnum orð hansara. Latið okkum hyggja at nøkrum av tí, hann lovar teimum:

1) **Gleði**. “EG fann orð Tíni, og eg át tey; orð Tíni vóru mær til frøi og hjarta mínum til gleði; tí navn títt er nevnt yvir mær, Harri, Gud herliðanna.” (Jer. 15,16. V.D. og Viderø)

2) **Kraft og styrki**. “Nú gevi eg tykkum yvir til Guds og náðiorðs hansara, hann, sum er mentur at uppbyggja tykkum og geva tykkum arvalut saman við øllum teimum, sum halgað eru.” (Áps. 20,32)

3) **Frið**. “Miklan frið eiga teir, ið lóg tína elska, og eingin er meinbogin teimum fyri.” (Sálm. 119,165) “Hevði tú givið boðorðum mínum gætur, tá hevði friður tín verið sum flóðin ...” (Jes. 48,18)

4) **Støðufesti**. “Altíð Harran eg havi fyri eygum mær, við honum til høgru handar mær eg fastur standi. Tí gleðist mítt hjarta og fegnast mín lund, ja, sjálvt mítt likam dvølist í trygdum.” (Sálm. 16,8-9)

5) **Framgongd**. “Henda lógbók má ikki víkja úr munni tínum, nei, tú skalt grunda á hana dag og nátt, so tú aktar væl eftir at gera eftir øllum tí, sum í henni stendur skrivað, tá skal gangast tær væl á øllum leiðum tínum, og tá skalt tú hava framgongd.” (Josva 1,8 V.D.)

6) **Svaraðar bønir**. “Verða tit verandi í mær, og verða orð míni verandi í tykkum, tá biðið um, hvat tit so vilja, og tað skal veitast tykkum.” (Jóh. 15,7)

Gleði, kraft og styrki, frið, støðufesti, framgongd og svaraðar bønir – tað er okkurt, sum øll vilja hava. Hvussu við tær? Tær nýtist ikki at leita longur. Gud hevur lovað tær alt hetta, um tú hvønn dag ert saman við honum í orði hansara.

“... et Ord til Dagen”

Effie Campbell umsetti.

# Guds Orð stendur fast

Guds Orð stendur fast – uttan mun til, hvat ið hendir. Sum ungur kristin hoyrdi eg sjómansprest Hans-Jakob Frøen tala. Hann vísti á, at hann ongantíð segði: "Bíblian sigur" ella "tað stendur í Bíbliuni." Men hann segði: "Guds Orð sigur", "skrivað stendur í Guds Orði." Hann helt, at størri myndugleiki lá í at siga Guds Orð enn Bíblian.

Vit liva í einari tíð, tá ið vit, sum standa á Guds Orði, verða kallað víðgongd og fundamentalistisk. Hatta fellur sjálvandi av sínum egna høpisloysi. Hatta er gamla søgan, sum Satan byrjaði í Edens urtagarði: "Man Gud hava sagt?" Hann roynir at sáa iva um Guds Orð, og gjøgnum tað vantrúgv. Men Gud setir Orð sítt hægri enn navn sítt. (Sálm. 138,2)

Tað er av alstórum týdningi at lesa í Skriftini. "Legg tær, inntil eg komi, eina við upplestrinum, áminningini, læruni. Gev gætur eftir tær sjálvum og eftir læruni; halt á við tí, tí at tá ið tú gert tað, skalt tú frelsa bæði teg sjálvan og tey, sum hoyra teg." (1. Tim. 4,13. 16). Út frá hesum Gudsorðinum vil Orðið frelsa teg. Altso: bjarga tær og føra teg ígjøgnum allar umstøður. Tað vil eisini frelsa tey, sum hoyra teg og lurta eftir tínum vitnisburði. Tað er sterkt!!!

Tá ið eg vitni fyri fólki, sum ikki eru trúgvandi, sigi eg: "Guds Orð sigur, at øll hava syndað, og at teimum vantar Guds heiður." (Róm. 3,23) Guds Orð sigur okkum, hvussu vit blíva frelst. Guds Orð er meir enn vanlig orð. Guds Orð er heilagt. Jóh 17,17: "Halga teir í sannleikanum; Orð títt er sannleiki."

Guds Orð er ein afturlatin bók uttan Andans vegleiðing, tí mugu vit biðja Gud – áðrenn vit fara undir lesturin – vælsigna Orðið og lata tað upp fyri okkum.

Tá ið tað ræður um at fáa børn okkara frelst, so sigi eg Jes. 54,13 hart: "Tá verða øll børn tíni lærusveinar Harrans og skulu njóta miklan frið." Tá ið tað ræður um grøðing, skulu vit lesa hart yvir okkum 1. Pæt. 2,24: "Hann bar sjálvur syndir okkara á likami sínum upp á træið, fyri at vit, deyðir frá syndunum, skulu liva fyri rættvísini. Við sár hansara eru tit grøddir."

Guds Orðið er sum regnið og sum ein hamari, ið knúsar fjøll. Tað vísir okkum, at vit hava ikki bara brúk fyri regndropum. Vit hava brúk fyri nógvum regni, fyri at tað skal spíra og vaksa. Soleiðis er tað eisini, tá ið vit sláa við einari sleggju á ein stein, tá mugu vit sláa mangar ferðir. (Jes. 55,10-11 og Ez. 36,26)

Summi trúgva, at allir átrúnaðir eru líka góðir, og at tað eru mangir vegir til frelsu og til Himmals. Men sum kristin trúgva vit á Guds Orð, og tí vita vit, at tað er bara Jesus, sum er vegurin, sannleikin og lívið, og sum kann frelsa okkum frá einari ævigari galtan.

Tá ið vit sum samfelag ella einstaklingar fara burtur frá Guds Orði, fær tað vanlukkuligar avleiðingar – ikki bara fyri okkum, men eisini fyri onnur. Statt á Guds Orði, vikast ikki frá sannleikanum. Boyggj teg fyri Guds Orði, og tú fert altíð at vinna sigur. Døm alt, tú gert, út frá Orðinum, og signingin vil fylgja tær. So einfalt og kortini so torført, tí vit sum menniskju liva í einari óndari verð.

Effie Campbell umsetti.

# Hetta broytti mítt bønarlív

Kai Johansen

Er tað nakað, sum ein pastorur ella prestur veit, so er tað, at bøn er týdningarmikil. Eg visti tað, og tí bað eg. Ikki so nógv av tí at eg vildi, men mest av tí at eg visti, at eg átti. Men nú er øðrvísi. Nú eru mínar dagligu løtur við bøn og Bíbliu vorðnar mínar dýrastu løtur, og eg hugsaði mær at luta við tær, hvat ið hendi, fyri kanska at kunna hjálpa tær.

Eg hevði skift út tørvin á Gudi við okkurt annað í mínum lívi. Millum annað hjálpti nakað mær, sum C. S. Lewis hevur sagt: "**Søga menniskjans er ein long andstyggilig frásøgn um, hvussu vit royna at finna eydnuna í onkrum øðrum enn í Gudi**."

Sum menniskju royna vit at gerast eydnusom. Gud hevur skapt okkum soleiðis, so einki skeivt er í tí; men ætlan hansara var, at hann skuldi vera okkara kelda. Tí gerst tað skeivt, tá ið vit fara at gera okkum tengd at gávunum í staðin fyri gevaranum. Tá ið vit skifta Gud út við okkurt annað, fáa vit tað, sum Bíblian kallar avgudar.

Tað var tað, eg sá. At eg hevði avgudar í lívi mínum, og teir liggja enn og lúra. Ein avgudur er okkurt, sum fyribils fyllir tann tørvin, sum bara Gud kann nøkta.

Vit hugsa, at avgudar eru í Afrika og India, og tað eru teir; men eg havi verið har, og eg ivist onga løtu í, at talið á avgudum er mangar ferðir størri í Vesturheiminum enn í triðja heiminum. Her tykist tað, sum tað eru fleiri hundrað ting, sum vit fyrst skulu royna, at vita um tey gera okkum eydnusom, áðrenn vit royna Gud.

Eg plagi at siga, at okkara avgudar eita: Eg vil hava viðurkenning, Eg vil hava framgongd, Eg vil vera væl umtóktur, Eg vil avrika, Eg vil vera í miðdeplinum. Og listin kundi verið nógv longri av tingum, sum vit heldur taka enn Gud, fyri at gerast eydnusom.

Eg hevði skift Gud um við tørvin fyri at hava framgongd í kristnari tænastu! Sjálvt ein kristin tænasta kann gerast eitt endurgjald fyri felagsskapin við Kristus! Eg merkti tað, tí eg kendi meg nøgdan, tá ið alt gekk væl, og argan og smásáran, tá ið illa gekst. Synd er í veruleikanum einki annað enn at líta á seg sjálvan staðin fyri at líta á Gud. Jesus segði: "Syndin er, at teir ikki trúgva á meg." (Jóh. 16,9) Tað var mín trupulleiki. Eg hevði roynt at fingið í lag mína egnu lukku, uttan Gud sum mína fyrstu keldu. Tá ið eg skilti tað, vendi eg um og játtaði synd mína. Bíblian sigur, at Gud býr hjá teimum, sum hava eitt sundurbrotið hjarta (Sálm. 34,19), og eg kendi, at hann var nær á ein nýggjan hátt.

Bøn er felagsskapur við Gud. Nú er hann vorðin mín kelda, og tí loysi eg trupulleikarnar á ein nýggjan hátt.

Effie Campbell umsetti.

# Vinur

"Vinur" er eitt av teimum vakrastu orðunum, eg kenni. Hoyr, hvat ið Jesus sigur: "Eg kalli tykkum ikki longur tænarar; tí at tænarin veit ikki, hvat harri hansara ger; men tykkum havi eg kallað vinir; tí at eg havi kunngjørt tykkum alt tað, sum eg havi hoyrt av faðir mínum." Jóh. 15,15. Eftirfylgjarar Jesusar kallaðu hann: Harra, Meistara, Lærara og enntá Messias – frelsarakongin. Her sigur Jesus: "Nú kalli eg tykkum vinir, ikki tænarar." Summi okkara hava kanska ímyndað okkum Jesus sum harra, arbeiðsgevara – við mongum áminningum og forboðum. Her sigur Jesus: "Eg kalli tykkum vinir."

Við ein vin hava vit eitt heilt serligt samband. Eitt samband við virðing fyri bæði nærleika og fráleika. Tað er eitt samband uttan tignarstøðu ella tittul. Vit kunnu hittast eftir 20 árum, og sambandið er har. Persónin kennir tú aftur. Ella tað kunnu vera vinir, sum tú hittir dagliga.

Gransking innan sálarfrøði, sosiologi og heilsu vísir, at vinir eru avgerandi fyri sinnisligu heilsuna. Mær nýtist ikki nógvar vinir, ein góður vinur vigar nógv meira enn fleiri óstøðugir og gáloysnir. De Lillos syngur: "Hold på en venn, få blir igjen – en venn kan fort bli borte for godt, om du glemmer ham lenge nok."

"Fylg mær," sigur Jesus og virðir mítt val, bæði um nærleika og frástøðu. Sum barn lærdi eg ein sang: "Velg ham din frelser, velg ham for livet, en bedre venn kan du aldri få. Blir han venn i ungdomstiden, er det givet, at han er med til sidst, når du blir gammel, grå."

Eitt vers ljóðar soleiðis: "Hvor trygt, når livets alvor møter deg på ferden, å ha en venn som hjelpe kan og alt forstår. Om du blir hånet, misforstått i denne verden, fortrøstningsfullt til Jesus frelseren du går."

Eitt er vist: Fyrr ella seinni renna vit okkum í lívsins álvara. Tað kann vera so ymiskt fyri tann einstaka. Tá er gott at hava ein vin, bæði í Himli og á jørð.

Tá ið hesin vinurin doyði, rópti hann: "Tað er fullgjørt!" Eg havi gjørt tað – fyri teg, góði vinur! Á krossinum verður rópt út: "Eg eri vinur tín! Í allari víddini, sum hetta orðið rúmar.

Jesu lív vísti, at hann var ein vinur. Hann hevði ávirkan á menniskju bæði likamliga og sálarliga. Hann tosaði, át og gekk saman við teimum. Hann uggaði, græt og flenti við teimum.

Eg havi ein vin í Jesusi. Ikki ein trælafúta, men ein, sum eg gangi saman við í gerandisdegnum, og sum góðtekur meg, sum er eri.

Jesus eggjar okkum til at vera ein vinur, sum sýnir umsorgan. Hann hevur brotið múrin niður millum tey, sum eru fíggjarliga væl fyri, og tey særdu, tá ið hann doyði. Frá hansara sjónarhorni er eingin munur millum rík og fátæk, ella millum væleydnað og miseydnað. Jesus kallar okkum øll við tí vakrasta navninum í hesi verð: Vinur!

Má Jesus vælsigna tykkum øll.
Sten Sørensen

Effie Campbell umsetti.

# Andakt

Tað er trupult at lesa Sálm 22 uttan at hugsa um, hvat profetarnir skrivaðu um, hvat hendi langa fríggjadag.

Guð mín, Guð mín! Hví ert tú farin frá mær?

David ber fram nakað, vit øll menniskju uppliva: máttloysi,hjálparloysi, várkunn frá øðrum menniskjum og ágang uttanífrá.

Hann upplivir bæði andaligt, likamligt og sálarligt máttloysi.

Hvat skal hann gera?

Hann minnir Guð á, hvat hann gjørdi í forum. Til tín høvdu fedrar várir lít, teir litu á teg, og tú bjargaði teim. (ø.5)

Tað er samstundis ein játtan, at Guð er søgunnar Guð, og at hann er hin sami í gjár og í dag, ja, til ævigar tíðir, og hjá honum er ikki skuggi, sum kemur og fer. Guð er óbroytiligur!

Mitt í øllum hesum syndarliga, vendir David sær til hansara, sum hevur alt vald – eisini á tí, sum hann nú upplivir sum óskiljandi. Hann upplivir mannminkan, men hann sær samstundis hann, sum frá føðing var Guð hansara, og sum gav honum tryggleika við móðurbróst.

Sama, hvørjum vit møta her í  lívinum, mugu vit venda okkum til hansara, sum er Guð yvir alt og øllum og vita, at sama hvat vit koma at uppliva í lívinum, er Guð okkum nær.

At Jesus møtti einum Guði, sum fór frá honum, merkir, at tú ongantíð skalt møta einum Guði, sum fer frá tær.

(Týtt hevur Sólvá Syderbø)

# Hvat er eitt líknilsi ?

Fatanin av líknilsum Jesusar er, at tey eru prædikumyndir. Áskoðanin er, at tey eru náttúrligar myndir, ið skulu gera sannleikan um Guds ríki betur skiljandi og meira livandi fyri tí ið lesur. Soleiðis er vanliga hugsanin, og leita vit í eina bíbliuleksikon, ella vanliga leksikon, so finna vit einahvørja lýsing ið stuðlar hesi fatan.

Soleiðis sæð er henda fatan ikki ónatúrlig. Líknilsi eru jú ofta hugsað søga, ið greiðir frá einumhvørjum í dagliga lívinum, fyri á tann hátt at varpa ljós á tað andaliga økið. Tað liggur okkum tí nær, at lata hugin leita til prædikumyndina. Men júst hesin hugsunarháttur er vandamikil. Hyggja vit nærri at, síggja vit, at hetta stríðir ímóti tí ið Jesus sjálvur sigur um líknilsi síni, t.d. Matt. 13. Eisini stríðir hetta ímóti nøkrum øðrum: Líknilsini vísa seg ofta at vera sera ónatúrligar myndir. Hóast hesar myndir kunnu tykjast eyðsæddar og týðiligar, og eingin ivi kann vera um hvat tær sipa til, so eru tær als ikki natúrligar. Kortini eru fleiri sløg av líknilsum. Serliga líkjast líknilsini í Lukas Evangeliinum burturúr, tá samanberast skal við onnur. Hesi eru mest at meta sum fyrimyndar-søgur. Tað vil siga dømi úr dagliga lívinum, flutt yvir á andaliga økið, og á tann hátt borin fram fyri okkum sum líknilsi.

**3. Líknilsi og myndatala.**

Parabel er tað veruliga heitið á líknilsi. Navnið stavar frá grikska orðinum parabole, sum nýtt verður í Nýggja Testamenti. Parabole er runnið av einum orði, ið merkir at leggja okkurt undir liðina á einum øðrum, sammeta. Í tulkingini av líknilsum ræður júst um at finna hesa samanbering og nýta hana. Tað kann vera sera vandamikið at flyta øll fyribrigdi í einum líknilsi yvir, tí ein slík flyting kann lættliga førka ein burtur frá samanberingini, og harvið frá tí hugsaða innihaldinum í líknilsinum. Hetta síggja vit t.d. best í líknilsinum um hin lítarleysa húshaldaran í Luk. 16. 1-13. í hesum líknilsi er bert ein einasta samanbering: Børn ljósins, tey kristnu, eiga at vera eins klók, tá hugsað verður um framtíðina, ævinleikan, sum børn heimsins, tá hugsað verður um jarðisku framtíð teirra. Heilt øðrvísi er við myndataluni, sum á grikskum nevnist allegori, ið merkir, tala øðrvísi. Dømi um hetta: "Eg eri hin góði hirðin" sigur Jesus í Jóh. 10. Her verður ikki sagt, at Jesus líkist einum góðum hirða, men hann er ein góður hirði. Somuleiðis verður sagt um lærusveinarnar, at teir ikki bert líkjast seyðinum, men at teir eru seyðir hans. Júst á sama hátt er tað í Jóh. 15: "Eg eri hitt sanna víntræið, tit eru greinarnar". Jesus líkist ikki

einum víntræi. Hann er tað. Vit líkjast ikki greinunum. Vit eru greinarnar á trænum, øll vit sum trúgva á Jesus. Rætt er, at myndatalan eisini verður nevnd líknilsi í bíbliutýðingum okkara, men vit síggja kortini at aðalmunur er millum tað at tala í myndum, og at gera samanberingar. í myndataluni kann tað gerast í fluttari merking. í líknilsinum ræður um at halda seg innanfyri samanberingina. Nú er tað kortini so, at mangar líknilsisfrásagnir hjá Jesusi eisini um somu tíð eru myndatala. Tað merkir, at so satt vit halda okkum innan rammuna á líknilsinum, kunnu vit eisini úr tí flyta hvørt einasta brot.

**4. Egna tala Jesusar um líknilsi síni. Tíðarhvarvið tá Jesus talaði líknilsum.**

Í fyrstani var boðan Jesusar ikki í líknilsum. Tað er ikki fyrr enn í 13. kapitli í Matteus Evangeliinum at vit síggja eina veruliga boðan í líknilsum. Tann parturin av Matteus Evangeliinum sum 13. kap. stendur í, snýr seg um hvussu mótstøðan móti Jesusi meira og meira økist. Rætt er tað, at stór fólkamongd fylkist rundan um hann, men kjakið um hann er nógv. Mótsetningurin millum Jesus og átrúnarligu leiðarar Ísraels er vorðin meira týðandi. Hetta síggja vit ikki minst í kap. 12 í Matteus Evangeliinum. Í Ovastaráðnum og millum farisearar merkja vit týðiliga, at ein fíggindsskapur móti Jesusi tekur seg upp, og tað er klárt, at hesin fíggindsskapur breiðir seg út millum stóran part av fólkinum. Tað er soleiðis neyvt samsvar millum líknilsinsboðanina og mótstøðuna Jesus fær frá fólkinum. Í dag verður mangan framhildið, at Jesus talaði við atliti til samtíðar áskoðanina. Ja, sagt verður at Jesus nýtti eitt myndamál sum samtíðin skilti. Einki er meira ósatt at halda uppá, enn hetta. Fyri samtíðini var Jesus ein gáta. Skiltur av fólkinum ?, tað var júst tað hann ikki var, og var tað nakað sum Jesus als ikki gjørdi, so var tað at gera nýtslu av samtíðar áskoðanini. Ein maður ið talar málið ið samtíðin skilir, verður ongantíð illa lýddur. Jesus kundi verið høgt í metum millum fólk og andaligar leiðarar, talaði hann eitt mál tey skiltu. Men tað gjørdi hann ikki. Tað er heldur ikki rætt at siga, at Jesus gjørdist illa lýddur, tí hann setti seg upp ímóti tí "verandi". Tað gjørdi Jesus ongantíð. Hann var sera lóglýðin, og er tað nakað Jesus alla tíðina legði dent á, so var tað, at hann júst var komin til tess at uppfylla skriftirnar. Alt tað hann ger, og alt tað ið hendir, grundgevur Jesus við, at tað sum stendur hjá profetunum í Gamla Testamenti, skal ganga út. Í Jóhannes Evangeliunum fimta kapitli leggur Jesus ferð eftir ferð dent á, at hann talar tað sum hann hevur sæð og hoyrt hjá Faðiri sínum í Himli. Hann fer so langt sum at siga: "Eg kann als einki gera av mær sjálvum, eins og eg hoyri, soleiðis dømi eg, og dómur mín er rættvísur, tí at eg søki ikki vilja mín, men vilja hansara, sum sendi meg (Johs. 5.30). Hann tekur ikki fyrilit fyri sær sjálvum, og ei heldur fyri øðrum menniskjum. Men hann boðar nakað sum einki annað menniskja nakrantíð hevur

boðað, og hetta er alt ein einasta stór gáta fyri samtíð hansara.

Siga vit at Jesus er ein gáta í okkara tíð, hvussu nógv størri gáta var hann ikki fyri samtíð sína. Er tað nakað sum Jesus ikki hevur gjørt, so er tað at boða áskoðan samtíðarinnar, og at tala málið hjá samtíðini.

Tað er júst hetta ið gongur aftur í líknilsum Jesusar. Tað hann sigur í líknilsum sínum, er ikki at finna í samtíðini. Tí nevnir hann líknilsi síni Himmalsins loyndardómar (sí Matt. 13.11). Fyrsta líknilsi hansara í Matt. 13 kemur, sum nevnt, beint eftir eitt álvarsamt kjak. Ja ein samanbrest við andaligu leiðarar fólksins. Hetta líknilsi stendur í eini serstøðu og er sum eitt byrjanarstøði, til tess at skilja hvat Jesus annars sigur í líknilsum. Tí skulu vit hyggja nærri at tí.

**Fyrsta líknilsistala Jesusar og hvat vit læra av henni.**

Tað fyrsta er um sáðmannin. Støðan er tann, at nógv fólk hevur samlað seg um Jesus. Hann fer inn í ein bát og setur seg haðan at tala til fólkið, sum stendur inni á landi. Flest øll høvdu sagt, at hetta er eitt vælkent líknilsi. Sannleikin er tann, at vit ofta hava lisið tað, at tað ofta hevur verið talað yvir tað, og at tað soleiðis sæð á ongan hátt er okkum ókent. Kortini kann henda, at líknilsið júst ikki er serliga kent.

Vit skulu geva tí gætur, at Jesus byrjar líknilsið við orðinum: Sí. Á ein serligan hátt fyrireikar hann okkum at taka ímóti tí hann nú skal siga. Hjá okkum ræður tí um at fylgja hesi tilstuðlan.

Hvat er tað vit í veruleikanum síggja í hesum líknilsi ?. Er tað ein hvønndagssøga um ein bónda, ið fer út at sáa ?. Soleiðis tulka vit vanliga hetta líknilsi; men ein slík fatan kann ikki vera røtt. Hetta síggja vit, tá vit eygleiða hvussu lærusveinarnir hátta sær, tá teir hoyra hetta líknilsi. Ikki tí, Jesus hevur mangan nýtt samanberingar og stuttar líknilsismálberingar, sum vit kunnu nevna tað. Til dømis: "Tit eru salt jarðarinnar. Tit eru ljós heimsins". Hann hevur eisini talað um tað at byggja á hellubotn, og mong slík ting, ið bera samanlíkningar í sær, og er hetta sum so líknilsi. Men hetta líknilsi í Matt, 13, er fyri lærusveinunum nakað heilt nýtt. Tað síggja vit, tá teir í vers. 10 spyrja: "Hví talar tú til teirra í líknilsum?.

Lærusveinarnir halda hesa talu vera merkisverda. Teir skilja ikki hví Jesus talar so. Teir eru vísir í, at tað at tala á hendan hátt, ikki beinleiðis ger at fólkið ið lurtar skilir taluna. Tí seta teir, sum sagt, spurningin: "Hví talar tú til teirra í líknilsum.?"

Áðrenn vit hyggja nærri at svarinum Jesus gevur lærusveinunum, skulu vit fylgja áheitan Jesusar: Sí!. Hvat er sermerkt fyri hesa frásøgn. ?

Jú, tað er ein sáðmaður ið fer út at sáa, og hann sáar uttan at gáa eftir hvar sáðið fellur. Líknilsi er so statt bæði týðiligt og klárt;

men gevur tó onga sanna mynd av einum bónda ið sáar. Harafturímóti gevur tað eina ónatúrliga mynd av einum sáðmanni. Hetta vísir okkum, at í Guds ríki kemur tað heilt øðrvísi fyri, enn tað ger í hesum heimi. Frá tulking Jesusar vita vit jú, at sáðið er Guds orð. Líknilsið sigur okkum, at sáast skal fyrilitarleyst, so kann menniskja taka ímóti tí ella ikki. Líknilsið avmyndar ein sannleika í Guds ríki: Gud vil, at øll menniskju skulu koma at hoyra Guds orð. Gud vil, at øll menniskju skulu koma til kunnugleika um sannleikan, og verða frelst. Tað er sjálv grundhugsanin í líknilsunum.

Tað er so statt tað vit kundu nevnt tað ónatúrliga, sum hevur tann stóra týdningin. Hetta er eisini galdandi fyri mong onnur líknilsi Jesusar.

Líknilsið í Matteus 20 kapt. um bønarmenninar í víngarðinum, er til dømis ikki eitt líknilsi um arbeiði í Guds ríki, í vanligari merking, men eitt líknilsi um, at í Guds ríki verður ikki lønt eftir hvat fingið er frá hondini. Tað sama kann sigast um líknilsið um brúdleypið hjá kongssoninum. Har verða fólk ikki boðin eftir tign og mæti, verdugleika, ella ávísari støðu í samfelagnum, sum siðvenjan er tá kongshús halda brúdleyp, men boðið verður til brúdleyps, uttan at hyggja eftir hvørji tey bodnu eru, hvaðan tey koma, ella hvat avreksverk teirra er, ella ikki er. Har er bert eittans spurningur, alt snýr seg um: At hoyra og at taka ímóti innbjóðingini. Tað er tí eitt stórt mistak at siga, at líknilsini eru natúrligar myndir, ið greiða skulu frá andaligum sannleikum. Myndirnar eru, sum áður nevnt, eyðsæddar og greiðar; men tann stóri boðskapurin liggur ofta júst í tí, at tær ikki eru natúrligar.

Úr bókini hjá Øjvind Andersen "Sæden er Guds ord"

Suni Jacobsen umsettti.

Útgevari
Kirkjuliga Missiónsfelagið
Purkugerði 7
Fo- 100 Tórshavn
t- postur: kmf@kmf.fo

Heimasíða: www.kmf.fo
Ábyrgd: Kristian Thorleifsson
tel: 212856
Prent: KMF
Konta: 9181- 495.337.3

Kirkjuligt Missiónsblað
kemur út 8 ferðir um árið
(februar, mars, mei, juni, august
september, november og desember
Haldaragjald: kr. 200,00